DAGSINS MEINING

Aftur nú

Alt hatta rokið til onga verðsins nyttu. Torbjørn Jacobsen hevur leikað í eina løtu, men etur so alt í seg aftur. Vit kunnu bert enn einaferð staðfesta, at tómar tunnur buldra mest.

Hvat skuldi tað til? Torbjørn Jacobsen fór ivaleyst ikki heilt skeivur, tá hann í kjakinum karakteriseraði Fólkaflokkin. At hann so skuldsetti løgmann og fiskimálaráðharran er so ein onnur søk, men tað hevur hann so alt etið í seg aftur. Skuldsetingar sum tær, ið vóru á lofti, eru ov álvarsligar til, at menn ganga og tveita um seg við teimum, fyri so bert at halda øll til rukku og trekkja tær aftur í síðstu løtu. Hevur Tjóðveldisflokkurin ikki eitt stórt problem, nú Torbjørn Jacobsen eftir øllum at døma aftur hevur sagt ósatt alment?

Spurningurin er nú, hvør hevur bukað hvønn uppá pláss. Er tað Torbjørn Jacobsen, ið er bukaður uppá pláss av sínum egnu, ella er tað sum ikki einaferð Tjóðveldisflokkurin, ið er bukaður uppá pláss av Fólkaflokkinum. Tað er vist, at nógvir kamelar eru svølgdir fyri fullveldið. Tá nú fullveldisætlanin er løgd á ís og vit hava eina heimstýrissamgongu við borgarligari slagsíðu, við onkrari hissini yvirtøku, so er ilt at síggja, hví tjóðveldisflokkurin letur sær alt lynda. Fólkaflokkurin hevur øll vinnumál í Tinganesi og hevur tí buktina og báðar endar, meðan Tjóðveldisflokkurin sleppir at umsita nøkur mál undir heimastýrinum. Er tað, at sita við valdið vorðið eitt mál í sær sjálvum hjá Tjóðveldisflokkinum?

Nú tá fullveldisætlanin er løgd á ís, og vit hava eitt vanligt heimastýrislandstýri, so kemur alt týðiligari fram, at Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin hava ilt við at semjast um nakað sum helst uttan fullveldi. Áralagið hjá sitandi samgongu er sum at síggja grindalokk fara til gongu, og eingi tekin eru um, at hetta fer at batna.

Tað kann væl verða, at Torbjørn Jacobsen var heldur ófantaligur í orðavalinum í hansara seinasta nummari, men tað skerst ikki burtur, at Torbjørn Jacobsen hoyrir til teir í Tjóðveldisflokkinum, ið er ímóti privatiseringsætlanunum, sum Fólkaflokkurin kókar upp. Esini er hann eina teimum fáu Tjóðveldismonnunum, ið hevur talað alment ímóti privatisering av kongsjørðini. Nú er bara fryktandi, at hann eisini har fer at bakka, tá man eftir øllum at døma ikki kann taka alt tað, hann sigur, fyri fult. Óansæð hvat, so er hetta málið ikki deytt, tí onkur fer ivaleyst at minna seg sjálvan á, hvat málini viðvíkjandi løgmanni og Jørgen Niclasen snúðu seg um. At samgongan haltar víðari er ikki nøkur loysn, og í minsta lagi ein formansrunda hevði verið uppá sítt pláss.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Føroyar í altjóða kapping

Magni Laksáfoss
Streymnes 26.07.2002

Vinnupolitikkurin skal leggjast eftir at beina burtur forðingar hjá vinnulívinum, so vinnulívið fær best møguligu karmar at virka undir. At siga at eingin kapping er millum samfeløg er heilt burturvið.

Í frágreiðingini hjá Búskaparráðnum verður sagt, at politikkurin hjá Vinnumálaráðnum er heilt skeivur, tí hann tekur støði í at Føroyar eru í kapping við onnur lond.

Búskaparráðið sigur: *"Her [á vørumarknaðinum] kappast øll móti øllum uttan mun til landamørk. Tí er eingin meining í at tosa um kapping millum tjóðir á fiskamarknaðinum".*

Somuleiðis endar Búskaparráðið frágreiðingina við: *"Høvuðsorsøkin til skeiva vinnupolitikkin er tann grundleggjandi skeiva uppfatan, at samfeløg eru í altjóða kapping á sama hátt sum fyritøkur í altjóða kapping ..."*

Eg eri als ikki samdur við kritikkin hjá Búskaparáðnum. Eftir míni áskoðan er føroyski búskapurin í kapping við onnur lond og skal vinnupolitikkurin leggjast til rættis eftir hesum veruleika.

Samfeløg í kapping

Orsøkin til at samfelagið er í kapping við onnur samfeløg er, at allar tær føroysku fyritøkurnar hava somu fortreytir at arbeiða undir í Føroyum. Um tær somu fyritøkurnar høvdu valt at lagt seg í einum øðrum samfelag, vildu tær havt aðrar, møguliga betri, fortreytir at arbeitt undir.

Sostatt er kappingin millum samfeløg ein kapping um at bjóða fyritøkunum best møguligar arbeiðsumstøður, soleiðis at flest møguligar vinnufyritøkur vilja velja at leggja sítt virksemi í júst hesum samfelagnum og ikki í einum øðrum landi.

Munur á samfeløgum

Tá ein fyritøka skal kappast á altjóða marknaðunum, kann tað hava sera stóran týdning fyri kappingarføríð hjá fyritøkuni, um tað velur eitt land at leggja seg í, ella um tað velur eitt annað land.

Tað sum er avgerðandi fyri kappingarføríð er framleiðslukostnaðirnir. Her er talan um prís á rávøru, lønarlag, útbúgvin arbeiðsmegi, flutningskostnaður o.l.

Eitt samfelag kann sostatt kappast við onnur samfeløg við at bjóða betri umstøður fyri fyritøkurnar.

Vinnupolitikkurin

Vinnupolitikkurin má hava sum mál, at føroysku virkini skulu vera millum tey mest kappingarføru í heiminum. Tí skal vinnupolitikkurin innihalda tiltøk, sum eru privatu vinnuni at gagni og sum harvið økir okkara livistøði og vælferð.

Vinnupolitikkurin skal sostatt leggjast eftir at beina burtur forðingar hjá vinnulívinum, so vinnulívið fær best møguligu karmar at virka undir.

Hvørjar vinnur?

Kanningar vísa, at tey londini sum leggja seg eftir at betra kappingarføríð hjá høvuðsvinnuni og hjávinnum hjá høvuðsvinnuni, klára seg væl í altjóða kappingini.

Hetta vil í Føroyum siga, at vit skulu leggja okkum eftir at betra um kappingarføríð hjá fiski-, flaka- og alivinnuni, sum jú eru okkara høvuðsvinnur. Harumframt skulu vit betra um kappingarføríð hjá hjávinnunum, sum eru trolvirkir, skipasmíð, trollemmavirki o.l.

Í øðrum londum sæst ofta, at hjávinnurnar vaksa upp og gerast so stórar, at tær fáa týdning sum ein høvuðsvinna. Hetta vil í Føroyum siga, at virkir, sum lata vørur og tænastur til høvuðsvinnurnar, møguliga kunna gerast ein munagóð útflutningsvinna.

Vit skulu sostatt, efir míni meining, ikki hyggja droymandi eftir fjarskotnum nýggjum høvuðsvinnum, men heldur leggja okkum eftir at útvikla tær vinnurnar vit hava, soleiðis at onkur av hjávinnunum kann vaksa upp til at gerast ein nýggj høvuðsvinna saman við hinum høvuðsvinnunum.

Útbúgving og gransking

Vinnupolitikkurin skal ikki vera studningur til vinnulívið, tí tað vísir seg at avlaga vinnubygnaðin og elvir til ineffektivitet. Í staðin skal vinnulívspolitikkurin leggja seg eftir at beina burtur forðingar. Hetta kann t.d. vera útbúgvingar og gransking innan tey øki sum vinnan hevur brúk fyri. Talan kan eisini vera um at broyta kostnaðarstøðið. T.d. fór telekommunikatiónskostna ðurin niður tá Føroya Tele bleiv gjørt til partafelag og onnur feløg komu inn á marknaðin. Kann tað á sama hátt hugsast, at um SEV fær kapping, so fór orkuprísurin niður? Hetta hevði bøtt munandi um kappingarføríð hjá vinnuni - øllum vinnum, ikki einans útflutningsvinnuni.

Naohiro Amaya

At enda vil eg endurtaka orðini hjá fyriverandi varaídnaðarmálaráðharranum í Japan, Naohiro Amaya: *"Vinnulívsfólk dáma ikki væl at taka vágan av at nýta pening til gransking og nýútviklan. Tá tann ósjónliga hondin sostatt ikki syrgir fyri at tað verður granska og útvikla, so má tann sjónliga hondin syrgja fyri tí."*

Hervið er eisini staðfest, at tað almenna eigur at hava ein aktivan vinnupolitikk, tí politikkurin kann gerast avgerandi fyri at okkara livistøði gerst betur.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard
justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard
ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktiónin:
tel. 220507 tel. 333843
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Hvar er moralurin, Tobbi?

Aksel Johannesen
Klaksvík, hin 26. juli 2002

Tobbi hevur alment skuldsett Anfinn Kallsberg løgmann og Jørgin Niclasen landstýrismann fyri at hava eina so kriminella fortíð, at teir ikki høvdu kunnað sitið í stjórn í nøkrum øðrum landi í heiminum enn í Føroyum. Um skuldsetingarnar hjá Tobba eru rættar, er tað rætt, at Føroyar eru einasta demokratiska land í heiminum, ið hetta kann lata seg gera. Orsøkin til, at hetta hevur kunnað og kann lata seg gera í Føroyum er millum annað tann, at hesir báðir persónar hava ein parlamentariskan meiriluta aftan fyri seg á løgtingið, ið millum annað Tjóðveldisflokkurin og **Tobbi sjálvur** eru partar av.

Eg haldi, at Tobbi hevur skyldu til at greiða Føroya fólki frá, hví hann í ein stóran part av teimum seinastu 4-5 árini hevur verið partur av parlamentariska meirilutanum hjá løgmanni og framhaldandi er tað í skrivandi løtu, tá Tobbi sambært sær sjálvum er av tí fatan, at løgmaður hevur eina so kriminella fortíð, at hann ikki hevði kunna sitið í nakrari stjórn í nøkrum øðrum landi í heiminum.

Um nakað hald er í skuldsetingunum hjá tygum, Tobbi, átti tygum so ikki fyri langari tíð síðani at tikið tygara stuðul til løgmann aftur. Ella er tín hugburður kanska tann, at menn, ið tygum skíra fyri at hava eina so mikið kriminella fortíð, at teir ikki høvdu kunnað sitið í nakrari stjórn í nøkrum øðrum landi í heiminum, gott kunnu sleppa at stýra í Føroyum, so leingið tygum og Tjóðveldisflokkurin hava politiskan vinning av tí politikki, ið førdir verður.

Tobbi, hvar er moralurin?

Faroe Islands for sale

Sámal Matras Kristiansen

Í tí heldur baldruta kjakinum, ið í løtuni fer fram viðvíkjandi privatisering av Føroya Fiskavirking, eru nógvir spurningar, ið stinga seg upp. Tann kanska mest áhugaverda og grundleggjandi er spurningurin um hvat Føroyar í veruleikanum eru. Eru Føroyar eitt virki, eru Føroyar eitt samfelag ið broytist, ella eru Føroyar kanska ein heilag og ævugtgaldandi eind, og sostatt meiri eitt religiøst objekt enn nakað annað?

Í bløðunum hesar seinastu døgunum er fyrsti møguleikin, t.v.s. Føroyar sum eitt risastórt virki við einum búskapi, ið helst skal vaksa ár um ár, tann ið oftast er vorðin nevndur. Við øðrum orðum havi eg lyndi til at hugsa mær, at tað í hugaheimi føroyingra er tann búskaparliga fatanin av Føroyum - Føroyar sum tað grundarlagið, vit byggja okkara tilveru á - sum er tann alment galdandi. Hetta havi eg eisini mangan sannað í gerandispráti við fólk.

Tað, ið liggur til grund fyri hesari búskaparligu fatan, er at Føroyar eru ein meiri ella minni búskaparligur konstantur. Við øðrum orðum at tað ár fyri ár er nøkulunda tað sama vit kunnu vænta okkum at kunna gagnnýta av tilfeingi landsins, serliga fiskinum.

Sambært hesari fatanini er tað, at búskaparfrøðingar mæla landins kosnu at selja Føroya Fiskavirking til hægstbjóðandi, tað veri seg føroying ella útlending, tí at hetta gevur mestan vinning í krónum og oyrum. Her er einki at ræðast, tí marknaðurin er jú líka heilagur sum gud er hjá religiøsum fanatikarum, nevniliga tann einasti sannleikin. Av hesari búskaparfanatismu fylgja logikkir sum hesir: Tað er eitt búskaparligt grundarlag fyri Føroya Fiskavirking í dag, ergo, Føroya Fiskavirking fer at halda fram á nøkulunda sama hátt sum higartil. Politikkur og samfelagsfroði mugu undir ongum umstøðum blandast upp í analysuna, líka so lítið sum vit eiga at loyva kvinnuligum prestum í fólkakirkjuni.

At tað veruliga eru so nógv fólk, ið hugsa á henda hátt, eri eg sjálvandi keddur av at síggja. Men tað er nú so, at búskaparfrøði er so ómetaliga einfalt at greiða fólki frá, um tú væl at merkja kemur við einari einfaldari frágreiðing. Velur tú eina meiri torføra frágreiðing uppá hví tinginí hanga saman sum tey gera, sum eisini eg við hesari greinini havi í hyggju at gera, ja so verður frágreiðingin ikki góðtikin millum manna. Tað er jú so, at skal ein teori politiserast, skal hon vera løtt at skilja. Vit mugu fram við slagorðum og dylja allar tær truplu detaljurnar, ið vónandi ikki hava alt ov nógv uppá seg tá ið avtornar. Við øðrum orðum: Tað ið er lætt, tað er eisini rætt.

Heldur lítil fiskur í stórum hyli...

Burtur frá hesum lítla síðustøkkinum. Trupulleikin, eg dugi at hóma, er at Føroyar - í takt við tøkniligu menningina, og her hugsi eg serliga um teir alsamt vaksandi trolararnar, ið kunnu sigla jørðina upp og niður upp á stutta tíð - eru við at verða undirgrivnar sum ein sjálvsøgd búskaparlig eind. Í gomlum døgum var tað lætt at skilja tað heila. Tá vóru Føroyar í stóran mun bara Føroyar, við teimum sjálvsøgdu avmarkinum, ið hetta hevði við sær. Føroyar vóru isoleraðar.

Við tað at Føroyar sprongdu síni gomlu mørk, gjørdust vit sjálvandi ríkari, tí at búskaparliga grundarlagið gjørdist størri. Hetta hava vit notið gott av í Føroyum, og hava vit dugað rímiliga væl at handfarið okkara tilfeingi, hóast alt.

Nú er tað bara tað, at Føroyar, sum desillusioneraðir danskir sosialdemokratar plaga at taka til, hava "sejret ad helvede til". Fyritøkan Føroyar hevur veruliga verið ein gleðissøga. Tað hevur gingið strálandi, um vit bara líka gloyma tær ymisku kreppurnar, ið eisini hava verið, men sum vit so lukkuliga gloyma í góðum tíðum. Vit hava sigrað Føroyar út um alt mark, og harvið hava vit eisini gjørt Føroyar til ein part av sokallaða heimssamfelagnum. Føroyar eru í fullari ferð inn í globaliseraða heimin við øllum tí illa og góða, tað inniber.

Trupulleikin í dag er ikki tann, at føroyingar ikki klára at framleiða nóg mikið til at røkja sítt egna land, við ella uttan blokkstuðul. Her eri eg fullkomiliga samdur við tjóðveldismenn. Vit kunnu sum einki klára okkum uttanfyri ríkisfelagsskapin. Trupulleikin er jú ikki búskaparligur. Hann er politiskur. Trupulleikin er, at Føroyar ikki eru nøkur sjálvfylgja sum ein politisk og sosial eind longur. Føroyar eru átjan oyggjar í heiminum, og tað er ikki nógv av føroyska tileininum, ið man nýtist at vera búsitandi í Føroyum fyri at troyta. Við hesum bábelsstóru skipunum, ið nú skúma róman á føroysku havleiðunum, er jú ikki neyðugt at vera heimahoyrandi í Føroyum fyri at fara á flot á Føroya banka. Tú kanst tað sama vera skrásettur í t.d. Aberdeen ella Bergen. Tað er snøgt sagt ikki tvingandi neyðugt við einum føroyskum samfelagi á stødd við tí núverandi, fyri at troyta føroyska tilfeingið. Tað sama er uppaftur sjónligari við oljuvinnuni. Um vit ikki føra eina stranga lóggávu út í lívið og spæla uppá okkara (í løtuni sjálvsagda, men hvussu leingi afturat?) rætt til egið tilfeingi, so velur stórkapitalurin so gleðiliga at skíta á okkum.

Tjóðin eigur lívið í Føroyum

Um vit hugsaðu okkum tann næstan absurda tankan, at einasta grundin til at búgva í Føroyum var fyri at tjena pengar, so hevði neyvan verið rúm fyri fleiri enn fáum túsund føroyingum her í landinum. Vit skuldu havt nakrar bøndur at røkja haga, berg og bø, nakrar hummarafiskarar, nakrar alarar og onkran hendinga útróðrabát. Og so kanska nakrar fáar verksmiðjur og kanska eina lítla beding í Havn at klára bráðfeingisumvælingar, umframt eina lítla kommunalumsiting og nakrar turistguidir, tí Føroyar eru sum kunnugt eitt vakurt land, ið ríkir týskarar og danir gjarna vilja uppliva í frítíðini.

Hetta hevði verið nóg mikið til at røkja Føroyar kalt og kyniskt. Men soleiðis er veruleikin nú einaferð ikki, og soleiðis er neyvan nakar føroyingur, ið ynskir at Føroyar skulu vera. Men hví eru Føroyar so hættaðar sum tær eru? Svarið skal helst finnast í orðum sum mentan, mál, traditión, almenn umsiting, tjóðskapur, lokalpatriotisma o.l. Tað eru hesi tingini, ið halda lív í Føroyum, og ikki fiskurin. Grundin til at Føroyar eru ein fiskivinnutjóð er ikki, at tað endiliga er so praktiskt, tá ið hugsað verður um tann langa og dýra útflutningsvegin. Vit framleiða fisk í Føroyum, tí vit finna meining í omanfyristandandi orðum. Vit framleiða fisk (og onnur ting sjálvandi) í Føroyum fyri at hava ráð til at varðveita okkara tjóð og okkara mentan og til at reka ta almennu umsitingina í Føroyum. Við framleiða fisk fyri framhaldandi at kunna búgva í Føroyum. Vit búgva ikki í Føroyum fyri at framleiða fisk. TAÐ ER IKKI FISKIVINNAN, IÐ ER GRUNDARLAGIÐ FYRI TJÓÐINI. TAÐ ER TJÓÐIN, IÐ ER GRUNDARLAGIÐ FYRI FISKIVINNUNI.

Hyggið bara Hetland...

Uttan føroysku tjóðina, høvdu helst búð færri fólk í Føroyum enn í Hetlandi, ið fysiskt sæð jú er eitt "betri" land enn Føroyar. Hugsast skal um, at í tjóðarleysa grannalandi okkara búðu um farna aldarskifti tvífalt so nógv sum í Føroyum! Hesi seinastu hundrað árini er íbúgvatalið ikki vaksið, heldur ikki eftir at Hetland er vorðið eitt olju(hjá)land. Samstundis er føroyska fólkatalið trífaldað. Hetta er eftir mínari uppfatan av einari einastu orsøk: Tjóðini; okkara stoltleika av egnum landi og okkara kærleika til okkara mentan. Tjóðin er tað, ið skapar meining við at búgva í Føroyum. Og meining er eitt tað týdningarmesta ein menniskja kann eiga.

Tað, ið ein privatisering av Føroya Fiskavirking í veruleikanum er, er ein minking av búskaparliga mandatinum hjá føroyska "statinum" ella heimastýrinum. Við øðrum orðum verður eitt av størstu stýringstólum landsins selt til "marknaðin", og úti á marknaðinum er tað sum kunnugt ikki tjóðin, men kaldi og kyniski kapitalurin, ið ræður fyri borg. Tað, vit ikki mugu gloyma í hesum kjakinum er, at vit við at selja Føroya Fiskavirking samstundis minka um ræsarúmið hjá Føroya Tjóð. Hetta fer við tíðini at hava ta ósvikaligu ávirkan, at grundirnar til at búgva í Føroya Landi verða alsamt færri og minni. Ikki bara vegna tess, at tjóðin, og sostatt løgtingsins vald, viknar. Eisini dugi eg alt ov væl at ímynda mær at føroysk fiskavirki verða burturrationaliseraði, tí at tað sum kunnugt er nógv bíligari at sigla trolararnar beinleiðis inn á marknaðin ella til lond við bíligari arbeiðsorku enn at viðgera hann í Føroyum fyrst og so at senda hann viðari. Hetta munnu øll, ið fylgja við føroyskum fiskivinnupolitikki, vera samd við mær í. Ikki minst reiðararnir.

Sjálvur eri eg tjóðveldismaður, hóast eg ikki altíð eru so glaður um alt teir stákast við í hasum flokkinum, t.d. at summir teirra - eingin nevndur, eingin kendur - tykjast vilja geva næstan hvat tað skal vera fyri eitt tómt hugtak sum fullveldi. Eg eri tjóðveldismaður, tí at eg trúgvi upp á tjóðina og at eg trúgvi upp á fólkaræðið. Við øðrum orðum trúgvi eg upp á tjóðveldið, vald tjóðarinnar, og so kunnu tóm hugtøk sum fullveldi og loysing renna og hoppa. Í staðin vóni eg, at tjóðveldismenn fara at nýta sítt hegni til at steðga ideologiska flippinum hjá fólkafloksmonnum, ið sum altíð eru fullkomiliga blindaðir av Mammon, ið er ein tann vandamesti avgudurin, ið er til.

Hvat er tað, vit vilja? Vilja vit arbeiða fyri at liva, ella liva vit fyri at arbeiða? Tað er greitt, at eg vil tað fyrra. Men hvat vil Føroya fólk? Hvat vilja føroyingar við sínari tjóð?